

## Ræstkjøt á Hotel Hafnia

Komandi leygarkvøld skipar Hotel Hafnia fyri ræstkjøtsveitslu. Tað verða bert føroyskar rávørur á skránni hetta kvøldið við kjøti av Stóru Dímun, Skælingi, úr Fámjin og Streymnesi. Føroyskar røtur og føroyskar rabarbur verða eisini á matarlepanum. Borðreitt verður við m. a. súltaðum røstum kjøti, ræstari súpan, kókaðum og steiktum røstum kjøti. Eisini verður ein smakkur av turrum og feskum kjøti. Omaná verða ymisk rabarbubland. Til borðhaldið verður felagssangur, har Hans Pauli Larsen og John Johansen undirhalda við harmoniku og gittara. Eisini fara Annika Waag og Petur Petersen frá Føroya Bjór at greiða frá um drykkivørurnar. Aftan á borðhaldið verður dansur har Sámal Ravnsfjall, Kolbein Simonsen og Ronnie Nielsen spæla.

## Zelaya úr Honduras

Manuel Zelaya, sum bleiv koyrdur úr forsetaembætinum í miðamerikanska landinum Honduras seinasta summar, fekk um vikuskiftið loyvi at fara av landinum. Zelaya varð koyrdur av landinum, tá hann bleiv koyrdur frá, men hann slapp aftur til Honduras fyri fýra mánaðum síðani. Hesa tíðina hevur hann verið á brasilsku sendistovuni, men í gjár varð kunngjørt, at stjórnin í Dominikanska Lýðveldinum hevur játtað honum, húski hansara og nøkrum starvsfólkum hansara innferðar- og uppihaldsloyvi. Honduras fekk nýggjan forseta í oktober.

# Lions Eysturoy læt lyftir til tey gomlu í Runavík

**Á samkomu á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi seinasta fríggjadag handaði Lions Eysturoy tvær lyftir sum gávu til heimið. Tordur J. Niclasen, fyristøðumaður, takkaði fyri, at lionsfelagið enn einaferð hevur víst gávumildni mótvegis heiminum.**
**– Stórfingnað gávan kemur sera væl við og fer at verða mongum at gagni, segði fyristøðumaðurin**

GÁVA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag handaði Lions Eysturoy tvær lyftir sum gávu til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim í Runavík.

Tað var Harley Joensen, virkandi formaður í felagnum, sum handaði lyftirnar.

Harley Joensen sigur, at tað var Røktar-og Ellisheimið, sum vendi sær til Lionsfelagið og spurdi, um tey høvdu møguleikan at hjálpa teimum at útvega hesar lyftir, sum skulu brúkast til at lyfta tey gomlu við.

Hvør lyfta kostar umleið 13.000 krónur, umframt kostnaðin av seðlunum, sum hoyra til hvørja lyftu.

### Aftur í søguna

Tað var fyristøðumaðurin á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, Tordur J. Niclasen, sum tók ímóti stórfingnu gávuni.

Í síni takkarrøðu mintist hann aftur á søguliga dagin, tá Lions Eysturoy sá dagsins ljós hin 8. desember í 1969, og tá felagið sum eitt tað fyrsta setti sær fyri at stuðla ætlanini at byggja Røktar- og Ellisheim í Runavík

– Hetta gjørdist eisini sjón fyri søgn, tá lionsfelagið nøkur ár seinni handaði stórfingna peningagávu, ið gjørdist eitt munagott íkast til, at Røktar-og Ellisheimið í Runavík gjørdist veruleiki.

Tordur J. Niclasen takkaði eisini Lions Eysturoy fyri, at felagið enn einaferð hevði víst gávumildni mótvegis heiminum og legði dent á, at henda stórfingna gáva kemur sera væl við og fer at verða mongum at gagni, sum hann tók til.



*Myndin er tikin, tá umboð fyri Lions Eysturoy fríggjadagin handaði tvær lyftir til Røktar-og Ellisheimið í Runavík. Tað er Harley Joensen, virkandi formaður í felagnum, sum handar Tordi J. Niclasen, lyftirnar*

Eftir handanina av lyftunum varð borðreitt við kaffi og onkrum leskiligum afturvið.

### Vælgerandi stuðul

Í Føroyum eru fimm Lionsfeløg, sum øll virka fyri vælgerandi endamálum.

Harley Joensen sigur við Sosialin, at feløgini verða rikin við tí limagjaldi, sum tey fáa, og síðan fer alt, sum savnað verður við ymiskum tiltøkum, óskert til vælgerandi endamál.

– Okkara felag hevur givið fleiri av eldrasambýlum í Eysturoy lyftir, og vit hava eisini latið barnadeildini á Landssjúkrahúsinum leikutoy, sigur virkandi formaðurin í Lionsfelagnum í Eysturoy.

Nú Reyði Krossur savnar inn pening til Haiti, hava føroysku Lionsfeløgini í felag latið 25.000 krónur til hjálpararbeiði har.

# Kristian Martin rokkið sínum endamáli

**Nú Nónhamar og Fjalshamar skjótt eru klárir at loysa, er tað ein fegin Kristian Martin Rasmussen, reiðari, sum ásannar, at felagið nú hevur rokkið sínum endamáli at verða við til at tryggja ráfiskagrundarlagið undir Kósavirkinum**

SKIPASØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Partafelagið Vár í Vestmanna, sum Tummas Christophersen og Dánjal Jacobsen eiga, hevur nú keypt ísfiskatrolararnar, Nónhamar og Fjalshamar frá partafelagnum Christiani í Grótinum í Klaksvík.

Leingi hevur verið upp á tal, at partafelagið í Vestmanna skuldi keypa trolararnar, sum felagið í Klaksvík keypti frá Føroya Banka í fjør.

Partafelagið Vár eigur eisini ísfiskatrolararnar, Nornagest og Kolumbus, sum eru lagdir. Skipini eiga hundrað og nakrar og fjøruti fiskidagar, sum vestmenningar hava søkt Fiskimálaráðið um at flyta yvir á Nónhamar og Fjalshamar.

Bíðað hevur verið eftir svari úr Fiskimálaráðnum, men nú hevur felagið í Vestmanna munnliga fingið at vita, at hetta er í lagi.

Kristian Martin Rasmussen, reiðari í Klaksvík, sigur, at teir enn ikki hava sæð skrivliga svarið, men teir ganga út frá, at øll viðurskifti nú eru í lagi.

Hann sigur, at menn nú eru umborð á Nónhamri og Fjalshamri og rigga til, og væntandi verða skipini klár at loysa um stutta tíð.



*Í løtuni verða ísfiskatrolararnir Nónhamar (mynd) og Fjalshamar gjørdir klárir, og tá teir eru komnir í vinnu, fara teir at landa veiðina til Kósavirkið í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Fegin maður

Kristian Martin Rasmussen sigur, at skipini eru seld partafelagnum Vár í Vestmanna við teirri treyt, at veiðan verður landað til Kósavirkið í Klaksvík.

– Tað eru tríggir partar, sum eru við í hesi avtalu – felagið hjá okkum, Kósavirkið og partafelagið Vár. Avtalan er, at Nónhamar og Fjalshamar skulu landa til Kósavirkið, sum kemur at rinda marknaðarprís fyri veiðina.

Kristian Martin Rasmussen sigur seg fegnast um, at tey fýra skipini, sum felagið keypti frá Føroya Banka í fjør, nú verða við til at tryggja ráfiskagrundarlagið undir Kósavirkinum.

Hinir báðir ísfiskatrolararnir, sum felagið í Klaksvík framvegis eigur og rekur, eru Safir og Smaragd, og teir landa eisini til Kósavirkið.